# Teir elska stilettir


eij@sosialurin.fo
*Eirikur í Jákupsstovu*



Menn fílast ofta á, at daman eigur minst 50 pør av skóm. Lá tað til hann, átti hon bara einar høghælaðar skógvar. Tí mannfólk elska stilettir.

– Daman við høgum hælum sær klænri út og brúkar mjadnarnar, tá hon gongur. Í veruleikanum ímyndar maðurin sær, at longu beinini krøkja seg rundan um hann, sigur Marit Holm Petersen, kærleiksráðgevi

**FAKTA**

- Longu í gamla Egyptalandi vóru høgir hælir eitt hitt.
- Bæði kvinnur og menn brúktu høgar hælir í Fraklandi í 1500-talinum.
- Ein franskur sniðgevi hevur sagt, at høgir hælir eru uppfunnir, fyri at fáa kvinnur at ganga spakuligari, tí tað er meira stílfult.